VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, um kvøldið minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið mánadagin:
Fleyr til gul av suðri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.

Veðrið týsdagin og mikudagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, mikudagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 17 stig.

Fuglin í fjøruni

Ferðaráð Føroya og Føroya Náttúrugripasavn hava í felag givið út ein nýggjan faldara um sjófuglar í Føroyum

KUNNING
Edvard Joensen

Til at kunna fólk, kanska serliga fremmand ferðafólk, um føroyska sjófuglin, hava Ferðaráð Føroya og Føroya Náttúrugripasavn givið út ein faldara, sum lýsir føroyska sjófuglin. Faldarin er prentaður á trimum málum. Føroyskum, donskum og enskum.

Faldarin, sum er prentaður í litum, sigur eitt sindur frá um sjálvan fuglin, um føðina hann tekur, nøring, tal og veiðuhættir. Eisini verður nortið eitt sindur við, hvørjum hóttanum hann kann koma út fyri.

Síðan verða nøkur ávís fuglasløg vald burtur úr rúgvuni og lýst við myndum og teksti.

Ein fjórðingur av faldaranum er brúktur til at gera kort, har ymsir túrar, sum gerast kunnu til at hyggja at fugli, verða lýstir.

Útgevararnir hava ikki latið ávarðingar og góð ráð ligið eftir, tí mint verður á, hvat skilagott er at gera, tá ein ferðast har, fuglur heldur til og eigur, eins og mint eisini verður á, hvussu ein eigur at bera seg at soleiðis í allari almindiligheit, tá ein ferðast í náttúruni.

Sera áhugaverdur er eisini tann parturin av faldaranum har greitt verður frá, nær fuglurin er í Føroyum og ikki minst, at upplýst verður um, hvussu nógv er til av hesum fugli.

Faldarin um Sjófugl í Føroyum er gjørdur við stuðuli frá Oljumálaráðnum, siga útgevararnir, og ætlanin er eisini at gera faldara av sama slagi um heiðafugl og kanska eisini býfugl í Føroyum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	7
Nuuk	9
Qaqortoq	16
Ammassalik	11
Saint John's	20
Halifax	22
Reykjavík	17
Seyðisfjørður	10
Tórshavn	12
Lerwick	14
Aberdeen	15
London	20
Tromsø	21
Bergen	19
Oslo	–
Stokkhólm	28
Keypmannah.	24
Helsinki	28
Moskva	21
Berlin	26
Warzawa	27
Kiev	21
Bukarest	23
Paris	22
Madrid	34
Róm	28
Malorca	30
Athen	30
Malta	30
Tunis	33
Beijing	31
New Dehli	27
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	14
New York	23
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	20
Panama	–
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	17

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 981 hPa. sunnan fyri Ísland fer í landnyrðing og grynnist. Brúgvalagið haðani til Føroya fer norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 997 hPa. við Hvarvið fer móti Íslandi

Lágtrýstið millum Íslands og Føroya fer spakuliga í landnyrðing. Hátrýstið sunnan fyri Írland fer móti Norðsjónum og mennist.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 23/07 kl. 06⁰⁰–24/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

AVFALLIÐ



Avfallið: 5,0 mm –mált frá 23/07 kl. 06⁰⁰–24/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 71,4 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

29. juli: Tendring
5. aug.: Fyrra kvarter
6. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
2. aug	10.40	23.02	09.40	22.02	09.55	22.17	00.19	12.40	01.19	13.40	08.55	21.17	07.55	20.17	10.55	23.17	11.55	—	10.25	22.47	11.40	—
3. aug	11.23	23.44	10.23	22.44	10.38	22.59	01.02	13.23	02.02	14.23	09.38	21.59	08.38	20.59	11.38	23.59	00.17	12.38	11.08	23.29	00.02	12.23
4. aug	—	12.05	11.05	23.27	11.20	23.42	01.44	14.05	02.44	15.05	10.20	22.42	09.20	21.42	—	12.20	00.59	13.20	11.50	—	00.44	13.05
5. aug	00.27	13.04	—	12.04	—	12.19	02.27	15.04	03.27	16.04	11.19	23.56	10.19	22.56	00.42	13.19	01.42	14.19	00.12	12.49	01.27	14.04

5 707265 100067 >